## Vigdís ætlaði sær frá

Fyrrverandi íslendski forsetin Vigdís Finnbogadóttir ætlaði at leggja frá sær í 1992. Tað stendur at lesa í einari nýggjari bók um hana. Talan er um eina ævisøgu, sum kemur út í hesi vikuni. Í bókini stendur, at Vígdís Finnbogadóttir iðrar segc um, at hon kortini varð sitandi í embætinum. Páll Valsson, sum hevur skrivað ævisøgu hennara, sigur við Morgunblaðið, at hon var undir stórum trýsti frá fólki, sum vildu hava hana at halda fram sum forseti, og at hon slakaði, hóast tað var ímóti hennara egna vilja. Páll Valsson sigur, at tað seinasta forsetaskeiðið hjá Vígdís Finnborgadóttir var strævið.



## Baskar tosa um frið

Batasuna, sum er tann politiski vongurin av baskisku loysingarrøtsluni ETA, mælir nú til friðarsamráðingar millum teir loysingarsinnaðu baskararnar og stjórnina í Madrid. Í einum tíðindaskrivi, sum Batasuna kunngjørdi leygardagin, stóð millum annað, at partarnir skulu samráðast um at beina øll vápn burtur og at lata politiskar fangar leysar. Sagt verður, partarnir eiga at brúka friðartilgongdina í Norðurírlandi sum fyrimynd, og at teir tí skulu binda seg til vápnahvíld, meðan samráðingar eru Sambært sponskum fjølmiðlum er tað ikki greitt, um ETA tekur undir við boðunum frá Batasuna.

# vur dundrandi hall




*Í greiningini, sum NOTA hevur gjørt yvir gongdina hjá føroysku fiskavirkisvinnuni árini 2004-2008, sæst, at virkini samanlagt hava havt hall øll árini*
*Mynd: Tilvildarlig*

niðurstøðu, at ymiskar orsøkir eru til vánaligu gongdina hjá føroysku fiskavirkisvinnuni.

- Her verður mett, at eitt nú gjaldføristrupulleikar til tíðir hava tarnað rakstrinum hjá summum virkjum í 2008. Tá slíkir trupulleikar hava verið, hava virkini kanska ikki verið so aktiv at bjóða upp á fisk. Virkir, sum kortini hava havt møguleikar at keypa, hava tískil fingið lutfalsliga bíliga rávøru.

NOTA heldur kortini ikki, at hetta sæst aftur í kanningini, sum tey hava gjørt.

- Okkara kanning vísir, at hetta ikki er galdandi fyri virkini samanlagt, tí rávøra og hjálpitilfar hevur ongantíð verið dýrari enn í 2008, staðfestir grannskoðaravirkið.

NOTA vísir í síni niðurstøðu á, at fíggjarkreppa og búskaparkreppa hava ávirkað marknaðin.

- Búskaparliga skrædlið í Íslandi og nógv viknaða íslendska krónan, fallið í bretska pundinum og norsku krónuni hava havt negativa ávirkan á kappingarførið hjá føroyskum virkjum.

### Vánaligt gjaldføri

Grannskoðaravirkið sigur, at vánaliga gongdin hjá fiskavirkjunum seinastu árini hevur elvt til umskipingar og rationaliseringar, og væntandi skulu fleiri til fyri at tryggja virkjunum framhaldandi rakstur.

- Tølini benda á, at virðisøkingin ikki stendur mát við gongdina, tá kapitalpartar, rentur, avskrivingar og "annar kostnaður", verða havd í huga í nevnda tíðarskeiði.

Við framløguna vístu Bjarni Arnason og Jacobina í Lambanum á, at gjaldførið hjá flakavirkisvinnuni er vánaligt.

- Orsøkin er stór hall, stórar íløgur, fígging av nógv øktum goymslum og skuldarum.

Niðurstøðan í greiningini er, at framhaldandi rakstur hjá stórum parti av fiskavirkisvinnuni er treytaður av, at íleggjarar og peningastovnar veita vinnuni neyðugu fíggingina til framhaldandi rakstur – og at raksturin framyvir fer at geva avlop.

Sosialurin kann leggja aftrat, at tey fýra feløgini, sum høvdu hampiligan rakstur hesi bæði árini (2007 og 2008), eru Fiskavirkið í Gøtu, Vaðhorn á Strondum, Delta Seafood á Tvøroyri og Sandoy Seafood.

# Meira um fiskavirkini

**Greiningin, sum NOTA hevur gjørt yvir fiskiflota og fiskavirkir, er rættiliga umfatandi og hevur nógv tøl, sum á ymiskan hátt lýsa gongdina. Sosialurin fer í øðrum bløðum at venda aftur til ymiskt av tí, sum er við í greiningini hjá grannskoðaravirkinum**



FISKAVIRKIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

NOTA sigur í síni frágreiðing á, at samanløgdu rakstrartølini yvir átta feløg, sum eru við í teirra greining, vísa, at raksturin síðan 2004 hevur givið hall.

- Stóra afturgongdin frá 2006 til 2007 skyldast einamest stór hall í dóttirfeløgum. Hesi feløg eiga og reka skip í samtakinum.

Sosialurin kann leggja aftrat, at talan í hesm førinum serliga er um P/F Føroya Fiskavirking og P/F Kósina, sum annars misti allar sínar ísfiskatrolarar fyri einum ári síðan, tá hesir vórðu seldir á tvingsilssølu.

Í aðrar mátar vísir greiningin hjá NOTA, at ráfiskanøgdin er svingandi árini 2004-2008, samstundis sum talið av virkjum er minkað.

- Framleiðsluvirðið er hesi árini økt við 23,9%, meðan rávøruútreiðslur og hjálpitilfar er økt við 42,7%. Bruttovinnigurin er minkaður við 8,1%.

### Aðrir kostnaðir

NOTA vísir á, at starvsfólkakostnaðurin eisini hevur verið svingandi hesi árini, men samanlagt er hann minkaður við 14,9%.

- Eisini hevur posturin "annar kostnaður", sum eitt nú fevnir um streymgjald, oljunýtslu, viðlíkahald, reingerð, flutningsgjøld, skrivstovuhald og leigu, verið svingandi og er 14,1% lægri í 2008 enn í 2004.

Grannskoðaravirkið sigur, at úrslitið áðrenn rentur og avskrivingar er lækkað munandi árini 2003 til 2004, men er síðan økt fram til 2007. Í 2008 lækkaði úrslitið tó aftur við 3,9%.

- Avskrivingar hava verið á nakað sama støði síðan 2004, og eru í 2007 lækkaðar við 0,9% í mun til árini frammanundan. Hinvegin eru rentuútreiðslurnar øktar munandi.

NOTA vísir á, at ársúrslitið hevur verið negativt øll árini, og serliga var afturgongdin stór í 2007.

- Síggja vit burtur frá ávirkanini av skiparakstri hjá nøkrum av hesum feløgum, hevur afturgongdi tó ikki verið so stór, sigur felagið.

### Ársverk og løn

Ein talva, sum NOTA hevur við í sínari greining, vísir, at talið av ársverkum í fiskavirkisvinnuni er minkað øll árini frá 2004 til 2008.

- Í 2008 eru soleiðis 160 ársverk færri enn í 2004. Tó skal havast í huga, at talið av virkjum er minkað úr 9 niður í 8.

Nota vísir eisini á, at árslønin hækkaði árini 2004 til 2005 og hevur annars verið støðug fram til 2007.

- Í 2008 er árslønin tó lægri, enn hon hevur verið nakrantíð áður hesi 5 árini. Samanlagt er miðal árslønin lækkað 1,2% hesi 5 árini, sigur grannskoðaravirkið.